# Uppleggið verður broytt



Seinna finalan um føroyameistaraheitið verður skírisdag í høllini á Hálsi. Dysturin byrjar klokkan 18.30. Útvarpið hjá Kringvarpinum sigur beinleiðis frá dystinum

*– Vit kunnu ikki brúka fyrru finaluna til nakað sum helst, uttan at vit skulu hava uppreisn, sigur Agnar Joensen.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** **Uppleggið miseydnaðist fullkomiliga seinast, ásannar Agnar Joensen, sum er royndasti spælarin á liðnum hjá KÍF. – Vit noyðast at standa tættari í verjuspælinum, heldur hann**

Uni Holm Johannesen

Tað var beinleiðis flóvisligt, heldur royndasti spælarin á liðnum hjá KÍF.

Nú má røkka ella støkka hjá kollfirðingum. Treytirnar eru einfaldar. Kravið er, at KÍF vinnur á Neistanum í høllini á Hálsi, um kollfirðingar skulu halda lív í vónini at vinna føroyameistaraheitið.

Neistin vann greitt í fyrru finaluni um føroyameistaraheitið. 11 mál skilti liðini tá avtornaði. 35-24. Nú mugu kollfirðingar taka sær um reiggj, heldur Agnar Joensen, KÍF. Hann hevur spælt fleiri slíkar avgerandi gulldystir fyrr fyri VÍF. Kollfirðingar rukku steypafinaluni í hesum kappingarárinum. Tað var fyrstu ferð, at hansara viðspælarar úr Kollafirði hava spælt avgerandi dystir. Annars eru teir óroyndir.

- Vit kunnu ikki brúka fyrru finaluna til nakað sum helst, uttan at vit skulu hava uppreisn, sigur Agnar Joensen.

## Verjuspælið broytast

Jan Ottesen, sum hevur evstu ábyrgdina av liðnum hjá KÍF, hevur lagt stóran dent á kropsligu venjingina í hesum kappingarárinum. Kollfirðingar hava runnið meira enn hinir. Tað hevur verið ein greiður fyrimunur í fleiri dystum. Teir avgjørdu fleiri dystir seinastu løtuna, tá mótstøðumenninir fóru at møðast.

Jan Ottesen hevur brúkt kropsliga støðuna hjá sínum spælarum at vera framrættaður í verjustøðuni. Í grundini hava kollfirðingar mansvart samfullar mótstøðumenn, tá teir eru í álopi. Tað miseydnaðist fullkomiliga seinast, tí Neistin var væl fyrireikaður. Neistamenninir gagnnýttu tómu plássini, og ágrýtnu kollfirðingarnir hugdu mest sum bara at, meðan stóra máltalvan taldi málini hjá Neistanum.

Agnar Joensen ásannar, at uppleggið miseydnaðist fullkomiliga. Tá Neistin fekk mál mest sum í hvørjum álopi, slapp KÍF ikki í skjótálop. Tað eydnaðist ikki serliga væl at hótta vælvaksnu verjuna hjá Neistanum, tá hon var upp á pláss. Tað skal broytast.

– Vit stríddust væl, men okkara framrættaða verja gav teimum ov lætt spæl. Tað verður helst broytt hesaferð. Vit noyðast at standa tættari í verjuspælinum, heldur Agnar Joensen, uttan at avdúka ov nógv.

## Kunnu vinnast

Munurin var stórur seinast. Kollfirðingar fingu uppreisn í seinna hálvleiki, men tá var greitt, at Neistin fór at vinna dystin.

Agnar Joensen er sannførdur um, at tað ber til at knógva Neistanum, sum hevur verið einaráðandi í føroysku kappingini seinastu árini.

– Vit skulu bara vinna við einum máli, og eg dugi ikki at síggja, hví tað ikki skal bera til. Kravið er, at uppleggið riggar hesaferð – tað riggar ikki seinast, sigur Agnar Joensen.

**Vit skulu bara vinna við einum máli, og eg dugi ikki at síggja, hví tað ikki skal bera til**

AGNAR JOENSEN, KÍF

uni@sosialurin.fo

## Hesi endaðu ovast

Bara finaludystirnar í bestu deildini hjá kvinnum og monnum eru eftir, áðrenn hondbóltskappingin 2010/2011 er av. Her er yvirlit yvir, hvussu liðini hava staðið seg í ymsu deildunum.

| DEILD | GULL | SILVUR | BRONSU |
|---|---|---|---|
| Atlantic | | | |
| 1. d. m. | KÍF | Kyndil | Neistin |
| 2. d. m. | KÍF | H71 | |
| U 20 m. | KÍF | VÍF | H71 |
| D 17 A | Kyndil | H71 | Neistin |
| D 17 B | StÍF | Neistin | H71 |
| D 14 A | H71 | Kyndil | Tjaldur |
| D 14 B | KÍF | Team Kl. | Neistin |
| D 12 A | VÍF | Kyndil | Tjaldur |
| D 12 B | VÍF | Kyndil | KÍF |
| D 10 A | Tjaldur | VÍF | H71 |
| D 10 B | Tjaldur | EB | SÍF |
| D 10 C | StÍF | Neistin | H71 |
| SunSet | | | |
| 1. d. kv. | Neistin | Kyndil | StÍF |
| 2. d. kv. | Neistin | VÍF | Stjørnan |
| U20 kv. | VÍF | StÍF | Neistin |
| G 17 | Neistin | Kyndil | Neistin |
| G 14 A | Neisitn | StÍF | Kyndil |
| G 14 B | Kyndil | Neistin | Sóljan |
| G 12 A | Kyndil | Stjørnan | H71 |
| G 12 B | Sóljan | H71 | Kyndil |
| G 10 A | H71 | VÍF | Kyndil |
| G 10 B | Kyndil | H71 | Kyndil |
| G 10 C | EB | Stjørnan | StÍF |

*kelda: www.kyndil.fo*